# Rasmus Seebach á Summar Festival

**SUMMAR FESTIVALUR** Stóra navnið í donskum popptónleiki fer at framføra á Summar Festivalinum. Rasmus Seebach kemur til Føroya við bólki og øllum sínum hittum

Eirikur Lindenskov

Tað eru minni enn tvey ár síðani, at Rasmus Seebach gav sína fyrstu fløgu út, men fløgan gav honum eitt rimmar gjøgnumbrot beinanvegin. Eftir ongari tíð kundi Rasmus Seebach kappast við tey størstu nøvnini í donskum tónleiki – bæði á hitlistunum og í sølutølunum. Ja, sjálvt Kim Larsen mátti víkja fyri nýggju poppstjørnuni á hitlistunum.

Rasmus Seebach hevur í meira enn 10 ár skrivað og framleitt tónleik saman við beiggja sínum Nicolai. Teir hava gjørt tónleik til kendar danskar bólkar og einstaklingar. Men í 2009 valdi Rasmus Seebach at geva sína egnu fløgu út, og tað gjørdi hann til ein ta størstu poppstjørnuna í Norðurlondum.

Við sangum sum Engel, Den Jeg Er, Lidt I Fem og Glad



Igen vann Rasmus Seebach upp á tónatindarnar, inn á dansgólvini og – ikki minst – inn á útvarpsrásirnar. Sangurin Engel var ársins lurtarahitt á P3 í 2009, og sangurin hevur eisini verið nógv spældur í Føroyum. Rasmus Seebach hevur higartil selt meira enn 150.000 eintøk av fyrstu fløgu síni, og á Zulu Awards í fjør vann hann tríggjar heiðurslønir.

Rasmus Seebach er nakað av tí heitasta og besta í donskum popptónleiki í løtuni, og í august kemur hann til Føroyar at framføra á Summar Festivalinum. Rasmus Seebach hevur bólkin hjá sær við, og hann bjóðar eitt ordans poppbrak á Vágsbøi fyrsta vikuskiftið í august.





Manning til Athenu og Poseidon

Til frystitrolarar okkara Athenu og Poseidon, tørvar okkum fólk til brúnna, galluna, maskinuna og dekkið/fabrikkina.

Og tá tú so hevur funnið útav at hettar er akkurát nakað fyri teg, so fert tú inn á heimasíðuna hjá thor: www.thor.fo – klikkir á knøttin “umsóknir til Athena” og fyllir umsóknina út.

www.thor.fo

FO-420 Hósvík · Faroe Islands · Tel 422 503
Fax 422383 · thor@thor.fo · www.thor.fo

THOR

*P/F THOR, er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni, og annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

Sosialurin

Í Miðlahúsinum mikukvøldið 4. mai 2011 kl 19.30

Kunningarfundur hjá Fróðskaparsetri Føroya

Fróðskaparsetrið hevur kunningarfund í Miðlahúsunum í Vágsbotni í Havn mikukvøldið 4. mai 2011 kl. 19.30

**Skráin verður hendan**
**kl. 19.30** Jóan Pauli Joensen, rektari bjóðar vælkomin
**kl. 19.40** Føroya Læraraskúli hevur orðið
**kl. 20.00** Náttúruvísindadeildin hevur orðið
**kl. 20.20** Føroyamálsdeildin hevur orðið
**kl. 20.40** Guðrið Hansdóttir syngur og spælur
**kl. 20.50** Sjúkraróktarfrøðiskúli Føroyahevur orðið
**kl. 21.10** Søgu- og samfelagsdeildin hevur orðið
**kl. 21.30** Guðrið Hansdóttir syngur og spælur
**kl. 21.40** Tikið verður samanum

